**Fiskimálaráðið**
*Sjóvinnufyrisiting*

# Avloysari fyri skrivstovufólk

Sjóvinnufyrisitingin søkir hervið eftir einum skrivstovufólki til eitt avloysarastarv vegna barnsburðarfarloyvi.

Sjóvinnufyrisitingin er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- málsviðgerð innan skipaskráseting, herundir Føroya Skipaskráseting, FAS og bátayvirlitið í Tórshavn
- skráseta heimildir, pantirættindir, brúksrættindir og onnur rættindir
- geva út tjóðskaparbrøv
- vanligt skrivstovuarbeiðið
- telefonavgreiðsla

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst viðkomandi utbúgving sum t.d.:
- skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum máli
- telduførleika á brúkarastøði
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Sjóvinnufyrisitingin.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 26. september 2002 kl. 15.30.

**Umsóknir skulu sendast til:**
**Fiskimálaráðið,**
att: Sjóvinnufyrisitingin
Postsmoga 347
110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálaráðið á telefon 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2984, Sp/f Víkingur, 100 Tórsahvn.
**Navn:** Sp/f Víkingur
**Adressa:** 100 Tórshavn
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 2799, P/F Viking Seafood.

*Skráseting Føroya tann 11. september 2002*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2985, Sp/f Viking Salmon, 490 Strendur.
**Navn:** Sp/f Viking Salmon
**Adressa:** 490 Strendur
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 2799, P/F Viking Seafood.

*Skráseting Føroya tann 11. september 2002*

*Kristin Balle*

---

**Sosialurin** -tað loysir seg

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Verkførari

Søkt verður eftir verkførara til sløkkiliðsstøðina. Verkstaðið á sløkkiliðsstøðini umvælir og og viðlíkaheldur akfør, amboð og onnur tól hjá Tórshavnar kommunu.

**Vit bjóða**
eitt fjølbroytt og spennandi starv, har uppgávurnar m.a. eru:
- at leiða og skipa arbeiðið á verkstaðnum
- vanligt verkstaðsarbeiði
- goymsluhald og innkeyp av eykalutum

**Vit ynskja**
at tú
- ert bil- ella lastbil mekanikari, maskinsmiður ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- hevur koyrikort til akfør yvir 3.500 kg
- at tú hevur fyrstuhjálparprógv
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og viðskiftafólk
- hevur kunnleika til KT, tekstviðgerð og rokniark á grundstøði
- hevur royndir innan maskinteknikk og at leiða og skipa arbeiði

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, tlf. 314881 ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. september 2002.

SNARSKIVAN

---

# Stórlosjufundur

Boðað verður frá, at Stórlosjufundurin verður leygardagin 19. oktober 2002 kl. 14.00 í Losjuni í Havn.

**Føroya Stórlosja**

# Landsting

Boðað verður frá, ta Landsting Fráhaldsrørslunnar verður leygardagin 19. oktober 2002 kl. 16.00 í Losjuni í Havn.

**Felgsnevnd Føroysku Fráhaldsfelaga**

---

# Kvinnufelagið

Aðalfundur verður mánakvøldið 30. september kl. 20 í Mettustovu. Uppskot til aðalfundin skal nevndin hava í seinasta lagi 23. september.

Er aðalfundurin ikki viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur hildin beint aftaná.

**Kvinnufelagið**

---

**Skeiðsdepilin við Marknagil – SDM**

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

# Buffét skeið

## 8. og 9. oktober 2002

**Endamál:**
At geva skeiðsluttakarunum førleika, íblástur og áhugaverd nýggj hugskot til matgerð av køldum og heitum rættum til frokostbuffét og -fundir.

- grønir rættir við max. 30 % fiti
- rættirnir verða borðreiddir í føtum
- lýsing, framseting og tilgerð av ymiskum nýggjum køldum og heitum rættum til matseðilin í køkinum
- frálæran er ein sameining av teori og praktik í køki og buffét

**Kostnaður:** 6.500,00 kr.
**Skeiðleiðari:** Faklærari frá Hotel og Restaurantskolen.
**Tilmelding:** áðrenn 20. september 2002

**Handverkarar kunnu søkja stuðul frá Yrkisdeplinum eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**
**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Yrkisdepilin og Vitan fáast á Skeiðsdeplinum. Skeiðið verður hildið treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg.

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374,
t-postur fh-sth@post.olivant.fo

---

# KFUM-Skótarnir, Glyvrar

Skóta-arbeiðið byrjar aftur mánadagin, 16. september, í Missiónshúsinum á Glyvrum.

Úlvar (1. og 2. flokkur): kl. 17.00
Úlvar (3. og 4. flokkur): kl 18.00
Skótar (5-9. flokkur): kl. 19.30

Verið vælkomin!

---

# Listafelag Føroya

Aðalfundur verður í Listaskálanum, mánadagin 7. oktober, kl. 19.00 við hesi skrá:

1) Nevndarfrágreiðing
2) Framløga av ársroknskapi
3) Nevndarval
4) Val av grannskoðara
5) Ymist

**Vinarliga nevndin**



# Tøknileiðari til SvF

Verandi tøknileiðari okkara leitar nýggjar leiðir og Sjónvarp Føroya søkir tí eftir nýggjum tøknileiðara.

Tøknileiðarin hevur ábyrgdina av viðlíkahaldi, supporti og útbygging av teknisku útgerðini hjá SVF, herundir eisini KT-kervinum. Hann umsitur alt innkeyp av KT- og tøkniútgerð. Hann leiðir dagligu tøkni- og KT-serviseringina av framleiðslu og umsiting. Hann er leiðari fyri tøkni- og KT-vørðarnar í húsinum, umframt fólkið, ið sendir. Somuleiðis stendur tøknileiðarin fyri útbúgving og skeiðvirksemi í sambandi við nýggja tøkni. Sjónvarpið er miðskeiðis í eini umfatandi umlegging av framleiðsluni frá analogari til digitala tøkni.

Tøknideildin er bygnaðarliga partur av framleiðsludeildini, ið samskipar og leggur tilrættis alla framleiðslu sjónvarpsins. 4 størv eru normeraði beinleiðis undir tøknileiðaranum.

**Útbúgving og royndir:**
Útbúgving innan KT- ella samskiftistøkni, ella tilsvarandi arbeiðsroyndir. Gott innlit í nýggjastu KT- og samskiftistøknina. Aðrar viðkomandi útbúgvingar og arbeiðsroyndir.

Royndir við arbeiði innan loftmiðlatøkni er ein fyrimunur, men eins stóran týdning hevur hollur kunnleiki til samskiftis- og KT-tøkni, og at tú hevur evnini at seta teg inn í nýggja tøkni og nýggjar uppgávur, analysera arbeiðsgongdir og finna og laga tøkniligar loysnir til tørvin í dagliga arbeiðinum hjá ymiskum starvsbólkum. Vit vænta okkum harumframt, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni.

Fyri tann rætta umsøkjaran er talan um eitt sera spennandi starv, har tú hevur møguleikan at vera við at menna nýggjar loysnir og arbeiðshættir fyri stovnin komandi árini. Sjónvarpið sum miðil stendur framman fyri kollveltandi tøkniligum avbjóðingum, har nógvir nýggir møguleikar fyri samskifti við brúkaran standa í boði. Sum tøknileiðari verður tú við til at ávirka, hvørjar loysnir og hvørji tøknilig tilboð til hyggjaran, ið Sjónvarp Føroya skal leggja dent á í framtíðini.

**Løn og setanartreytir:**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Miðað verður eftir at seta starvið frá 1. november, 2002, ella skjótast gjørligt.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 1. oktober, 2002.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra ella Jónheðin Tróndheim, tøknileiðara á telefon 340400.

**Sjónvarp Føroya**

***Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi umframt handilsligum virksemi.***

team85

---

# Leiga av svimjihyli og fimleikahallum

Tey, ið ætla at leiga svimjihylin og fimleikahallirnar (á Glyvrum og í Søldarfirði) veturin 2002/2003, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 23.09.2002.




**Runavíkar býráð**




---

# Fíggjar- og umsitingarleiðari í SvF

Starvið sum Fíggjar- og umsitingarleiðari í Sjónvarpi Føroya er leyst at søkja.

Fíggjar- og umsitingarleiðarin er settur beint undir og við tilvísing til sjónvarpsstjóran. Bygnaðurin á stovninum er flatur við eini stjórn við stápseindum, eini fíggjar- og fyrisitingardeild, eini framleiðslu- og tøknideild umframt programmdeildum.

Bygnaðurin í Sjónvarpi Føroya er seinastu árini munandi umskipaður; hetta er ein framhaldandi tilgongd, og fíggjarstýringin og mannagongdir annars verða støðugt tillagaðar bygnaðin. Komandi fíggjar- og umsitingarleiðarin má ganga undir treytirnar, at bygnaðurin framhaldandi kann verða broyttur.

**Starvið:**
Fíggjar- og umsitingarleiðarin hevur við ábyrgd mótvegis stjóranum dag-liga raksturin av stovninum um hendi, hvat viðvíkur fyrisiting og fíggjarstýring. Starvið fevnir soleiðis um:

- dagligt roknskapareftirlit
- starvsfólkaviðurskifti
- fyrisitingarligar mannagongdir
- dagligt keyp

Høvuðsuppgávur hjá fíggjar- og umsitingarleiðaranum eru at leiða og skipa fyri tí dagliga arbeiðinum á fíggjar- og fyrisitingardeildini og at leggja til rættis ársfíggjarætlanir og langtíðar fíggjarætlanir innan teir karmar, sum stovnurin hevur at virka undir. Ein týðandi leiklutur hjá fíggjar- og umsitingarleiðaranum er at virka sum samstarvspartur bæði hjá stjóranum og hinum deildarstjórunum í øllum fíggjarligum og fyrisitingarligum málum.

Sum er, er fíggjar- og umsitingarleiðarin virkandi stjóri, tá sjónvarpsstjórin er burturstaddur ella hevur forfall.

Arbeiðsuppgávurnar fevna um:
- dagligu roknskaparførsluna og at gera deildarroknskapir
- at seta upp roknskapir fyri tíðarskeið og ársroknskapir
- at hava um hendi rakstrar- og gjaldførisætlanir
- at skipa fyri mannagongdum á øllum fyrisitingarligum økjum
- leiðsluna av móttøkuni og skrivstovuni
- ábyrgd av ognunum, sum stovnurin húsast í

**Umsøkjarin:**
Starvið er avbjóðandi og spennandi, og hevur tú hug at royna teg krevst, at tú hevur lokið búskaparligt embætisprógv ella hevur aðra samsvarandi útbúgving. Viðkomandi royndir innan fíggjarstýring, fyrisiting og leiðslu hava eisini áhuga.

Tað er avgerandi, at tú sum umsøkjari ert opin, hevur ein liðiligan hugburð og hevur góð samstarvsevni. Í starvinum krevjast evni at arbeiða sjálvstøðugt og at taka avgerðir og at duga at kommunikera hesar á ein hátt, sum elvir til loysnir og framburð.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknir við CV, viðmælum, prógvum og øðrum viðkomandi skjølum skulu verða Sjónvarpi Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi tann 1. oktober 2002.
Ætlanin er at seta starvið 1. november 2002 ella skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra ella Finn Lómstein, fíggjar- og umsitingarleiðara, telefon 340400.

Tórshavn, 10. september 2002

Sjónvarp Føroya
M.A.Winthersgøta 2
Postboks 21
110 Tórshavn

**Sjónvarp Føroya**

***Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi umframt handilsligum virksemi.***

team85